Bill fylgir við Jógvan Martini

Eftir drúgt samstarv kring føroysku ungdómslandsliðini , fer Bill Jacobsen saman við Jógvan Martin Olsen at venja NSÍ

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað er nú nakað síðani, at tað var greitt, at Jógvan Martin Olsen skuldi verða venjari hjá NSÍ komandi kappingarár.

Nú er so eisini greitt, hvør skal verða hjálparmaður hansara. Talan er um 26 ára gamla Bill Jacobsen. Hóast unga aldurin so hevur Bill longu drúgvar royndir innan venjing. Millum annað hevur hann í nógv ár verið venjari í ungdómsrøðini hjá KÍ, og eisini hevur hann arbeitt við yngru føroysku landsliðunum, har Jógvan Martin Olsen jú hevur verið høvuðsvenjari.

Sostatt er talan ikki á nakran hátt um nakran óroyndan mann, sum kemur til Runavíkar, og ivalest telir tað eisini rætta vegin, at talan her er um ein mann, sum áður hevur arbeitt tætt saman við nýggja NSÍ-venjaranum.

Jens Erik fer at hjálpa FSV

Komandi árið fer Jens Erik Rasmussen at hjálpa vágamonnum í royndunum at vinna plássið í fyrstu deild aftur

Fyrrverandi landsliðsleikarin og fótbóltsútisetin fer komandi árið verða hjálparvenjari hjá Albert Ellefsen

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Tá FS Vágar í heyst mátti leiðina niður í aðru deild, vóru boðini úr Vágaoynni púrasta greið. Hetta fór á ongan at merkja, at felagið nú fór at repa seglini, men skuldu allar kreftir heldur nýtast til at vinna sær plássi í bestu deildini aftur.

Jens Erik fer at hjálpa

Hóast felagið síðani tá hevur mist kanska mest týðani leikaran í Tór-Ingar Akselsen, so tykjast vágamenn framvegis at hava gott mót, og nú hava teir so fingið sær ein trumf afturat.

Jens Erik Rasmussen, sum tey bæði seinastu árini hevur leikt við Leiftri í Íslandi, verður komandi árið hjálparvenjari hjá Albert Ellefsen, og umframt hetta fer fyrrverandi landsliðsleikarin eisini at spæla við á vøllinum.

Í fjør vóru Albert Ellefsen og Jonhard Joensen venjarar hjá FSV, eftir at Kestutis Latosa varð sendir til hús tíðliga á árinum. Sum skilst, so hevur Jonhard tó ikki havt hug at halda fram í hesum starvinum, og tí hevur verið tørvur á nýggjum hjálparvenjara. At hesin so eisini er av tí slagnum, sum uttan iva er ein stórur styrkur á sjálvum vøllinum, hava vágamenn so neyvan nakað ímóti.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fingið orðioð á Jens Erik sjálvan, men lítið er at ivast í, at talan verður um ein veldugan styrk fyri uppflytingarvónina hjá vágamonnum. Hóast tað er nakað síðani, at hann taldust millum teir útvaldu á landsliðnum, so hevur Jens Erik alla tíðna lagt nógva orku í fótbóltin. Hann er nú vorðin 33 ára gamal, men lættur sum hann er, er lítið at ivast í, at enn eru fleiri góð fótbóltsár í beinum hansara.

Hoyvík vann

Fríggjakvøldið varð skipað fyri árligu lærarakappingini í flogbólti í Havn. Kappingin fór fram á Eysturskúlanum.

Hetta er kapping, sum hevur verið á hvørjum árið síðani 1992, og sum hevur verið millum allar fólkaskúlarnar í Havn, Læraraskúlan og Studentaskúlan.

Undanfarnu árini hevur tað altíð verið Læraraskúlin saman við Venjingarskúlanum, sum hevur vunnið kappingina.

Aftur í ár kom Lærara-skúlin/Venjingarskúlin í finaluna, men hesuferð eydnaðist ikki at vinna steypið, sum í ár fór til Hoyvíkar skúla, sum vann dystin 2-1.

Um kvøldið skipaðu lærararnir á Studentaskúlanum fyri borðhaldið fyri øllum luttakarunum.

- fbf.fo

Silkeborg er vaknað

Eftir eina katastrofala byrjan er Silkeborg nú um at koma fyri seg í donsku superliguni

SUPERLIGA
Jákup Mørk

Seinasti dysturin undan vetrarsteðginum í donsku superliguni varð leiktur mánakvøldið, tá Silkeborg tók ímóti AGF.

Silkeborg hevur verið avgjørt størsta vónbrotið í superliguni hetta árið, og eitt skifti var eisini líkt til, at teir skuldu fara so syngjandi niður í næstbestu deildina.

Mánakvøldið vunnu teir tó 1-0 á AGF, og hetta var triði sigur teirra innan heilt stutta tíð, og hóast teir framvegis eru niðastir í deildini, so er tað nú bert eitt stig upp til Lyngby, sum er beint oman fyri niðurflytingarstrikuna, men sum tó eftir øllum at døma noyðist heilt niður í danmarksseriuna at spæla komandi ár.

Støðan í superliguni, nú farið verður í vetrarfrí, framgongur aðra staðni í síðuni.

Støðan, danska superligan

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Brøndby	18	12 - 4 - 2	44	11	33	40
2	FCK	18	9 - 6 - 3	29	16	13	33
3	AB	18	8 - 8 - 2	30	18	12	32
4	AaB	18	9 - 3 - 6	28	27	1	30
5	Esbjerg	18	9 - 2 - 7	28	26	2	29
6	FCM	18	6 - 7 - 5	25	17	8	25
7	OB	18	6 - 7 - 5	27	27	0	25
8	Viborg	18	4 - 8 - 6	21	23	-2	20
9	Vejle	18	4 - 4 - 10	22	45	-23	16
10	Lyngby	18	2 - 8 - 8	18	32	-14	14
11	AGF	18	3 - 5 - 10	18	33	-15	14
12	Silkeborg	18	3 - 4 - 11	14	29	-15	13

Føroyskir leikarar: Johan Byrial Hansen (OB), Christian Høgni Jacobsen (OB), Todi Jónsson (FCK)

Skips Sosialurin
- TÍÐINDI TIL SJÓFÓLK



Nú er tað gjørligt hjá okkara sjófólki at fylgja við hvat hendir
Fá ein heilan Sosial sum e-mail, hvørja ferð hann kemur út.

Henda útgáva er gjørd á ein slíkan hátt, at hon fyllir minst møguligt og tískil skjótt at heinta niður. Hetta er gjørt við at grafikkurin er tikin burtur, so einans teksturin er eftir og síðani pakkaður niður. Blaðið er sjálvútpakkandi á teldunni og verður lisið við browsara, umframt at møguleiki er fyri at skriva alt blaðið út.

Útgávan er serliga ætlað okkara sjófólki, ið hevur atgongd til e-mail umborð á skipinum.

Stuðlað Skips Sosialin hevur
KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævamaklarafelag

Tíðindablaðið
Sosialurin Box 76 110 Tórshavn
ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Skips - Sosialinum og fái fyrsta mánaðin ókeypis

Navn á skipi:
Kontakt pers.:
e-mail:
Undirskrift:

Hava tygum spurningar í hesum sambandi ring 213862 ella e-mail: skipssosialurin@sosialurin.fo

☐ Tekst útgáva
☐ HTML útgáva (uttan díetir)
☐ HTML útgáva (við díetir)

Sosialurin